Hátíðarhald við Stonehenge

Á hvørjum ári hátíðarhalda fólk ársins longsta dag ella summarsólstøður við Stonehange í Wiltshire í Onglandi, og soleiðis var eisini í ár. Hildið verður, at umleið 36.500 fólk vóru komin saman gjáranáttina, og tá sólin reis klokkan tveir minuttir í trý gjáramorgunin, hugnaðu fólk sær óført við tónleiki og dansi. Annars sóu fólk ikki so nógv til sólina, tí tað var skýggjað og tí heldur vánaligt sýni, skrivar BBC. Sambært løgregluni var tað fjølmenta hátíðarhaldið friðarligt, men at 37 fólk vórðu tikin fyri rúsevnanýtslu. Sambært BBC er áhugin fyri summarsólstøðuhaldinum við Stonehange vaksin nógv tey seinnu árini.



Tróndur í Gøtu loysir í Havn og stevnir norður á Gøtuvík at siga farvæl. Í Gøtu taka bátar ímóti og siga skipinum farvæl...
Mynd: Vilmund Jacobsen

- Tróndur í Gøtu hevur verið eitt gott skip, men tað er ikki stálið, sum vekir tankarnar, nú skipið er farið út flotanum, sigur Arni Hansen
Mynd: Vilmund Jacobsen

fóru undir. Vit spurdu Arna, hvar tankar hansara vóru, nú Tróndur í Gøtu helst fyri seinastu ferð var inni á Gøtuvík.

- Eg hugsaði slett ikki um skipið ella stálið sum fór, men um tey fólk, sum hava verið um hesa verkætlan, heilt frá byrjan til dagin í dag. Eg hugsaði um allar teir og øll tey, sum hava staðið aftanfyri og hava lagt rygg til, tá ryggur skuldi vera – og ikki minst um øll tey, sum einki beinleiðis hava havt við verkætlanina at gera, men sum altíð hava verið stuðlandi og hava verið við tí positiva orðinum.

Arni sigur, at Tróndur í Gøtu hevur verið eitt gott skip.

- Tað eru so mong, sum á ymiskan hátt hava notið gott av hesi verkætlan og tí, sum hon hevur verið við til at skapt og langt lunnar undir. Vit kunnu eisini siga, at var Tróndur í Gøtu ongantíð komin, høvdu vit neyvan heldur havt Finn Fríða í dag, sum eisini hevur roynst okkum hollur

Hann sigur, at felagið hevur havt og hevur framvegis sera dugnalig fólk, bæði teir gomlu, sum undan fóru og tær yngru kreftirnar, sum tóku eftir og nú eru álitið á brúnni.

Sosialurin kann skoyta uppí, at bæði Andre Hansen, sonur Arna Hansen og Bogi Jacobsen, sonur hin høvuðseigaran, Jákup Jacobsen, vóru blaðungir, tá teir byrjaðu at føra Finn Fríða – og í dag eru teir álitið á brúnni á flaggskipinum hjá P/F Vinnuni í Gøtu.

Ein vanlukka

Arni sigur, at eitt, sum hann hugsaði serliga nógv um, tá Tróndur í Gøtu fyri seinastu ferð lá á Gøtuvík seinnapartin fríggjadagin, var vanlukkan, sum í sínari tíð hendi, meðan skipið lá á Fuglafirði og riggaði til.

- Tá mistu vit ein av manningini, gøtumannin Jákup Mikkelsen, sum doyði av løstinum, hann fekk, tá hann fekk weirin um seg. Jákup var eisini ein av eigarunum av skipinum.

Hann sigur, at hetta er einasta veruliga vanlukkan, sum hevur rakt Trónd í Gøtu øll hesi ár, og teir vildu fegnir verið hana fyri uttan.

Sonur Jákup og Ragnu, sum var kona Jákup, hevur siglt við Finni Fríða, síðan skipið kom í flotan. Hann er útbúgvin skipsførari, og Árni dylur ikki fyri, at Aksel, sum ungi maðurin kallast, er á veg uppeftir "stiðanum" í felagnum, sum hann tekur til.

Tveir aðrir av synum Jákup og Ragnu hava eisini verið við onkrar avloysaratúrar sum sumrarnar, sigur Arni.

- Vit hava ilt av tí sum hendi, men hava øll hesi ár havt familjuna í huga, leggur hann aftrat.

Arni sigur, at av teimum 16, sum í 1987 løgdu lunnar undir felagið, sum átti Tránd í Gøtu, eru 11 eftir í dag.

- Summir eru farnir av náttúrligum orsøkum og aðrir, tí teir ikki ynsktu at halda fram. Hinvegin er "stamman" at kalla hin sama enn tann dag í dag, og tað haldi eg er virkuliga flott, leggur hann aftat.

Nýbygningur ávegis

Nú Tróndur í Gøtu er seldur, letur P/F Vinnan, sum høvuðsfelagið í Gøtu kallast, nýbygning smíða. Skrokkurin verður smíðaður eystanfyri, og skipið skal gerast klárt á Karstensens Værft í Skagen. Ætlandi skuldi skipið koma til landið í heyst, men hetta hevur drigið eitt sindur út, soleiðis at skipið ætlandi kemur um ársskiftið 2009/ 2010.

Byggikostnaðurin verður einar 230 miljónir krónur.

- Útlitini eru ikki so góð, sum tey hava verið, men vit vóna, at svartkjaftakvotan fer at økjast aftur. Í aðrar mátar vóna vit, at ikki bara pelagiski flotin skal bera niðurskurðir, ið koma. Í dag verður nógvur svartjaftur burturlutaður til frama fyri tosk í Barentshavinum, soleiðis at flakatrolararnir hava fingið øktar kvotur. Vit halda, at tá tað treingir saman um, eiga allir partar at taka lut í niðurskurðum. Men líkt er ikki til, at so er, sigur hann.

Arni Hansen sigur, at felagið í Gøtu er kent fyri at síggja ljós upp á framtíðina, og tað gera teir eisini, nú myrkari skýggj eru á luftini.

- Vit hava kanska verið í so bjartskygdir onkuntíð, men uttan bjartskygni og trúgv upp á, at tað fer at bera til, høvdu vit ongan veg verið komnir. Vit kunnu ikki brúka svartskygni til nakað, leggur hann aftrat.